

*Hesir tríggir jassarnir høvdu eisini leitað sær á La Carreta hetta kvøldið*

# Ein góður búffur

**Búffurin var góður á La Carreta, men tænastan var ikki beinleiðis í heimsklassa**

MATUR

*Heri á Rógvi*

Staðið eitur La Carreta í Vestmanna. Vit vóru fýra, sum settu okkum í bilum og koyrdu norður til Vestmanna. Klokkan var farin av átta hetta kvøldið, tá løgreglan eisini hevði sínar mátarar úti við vegin.

La Carreta hevur nú verið ein fastar partur av bygdamyndinum í Vestmanna í fleiri ár nú. Tað ber eisini til at gista á La Carreta, og eftir hvat vit skilja á lagnum, so taka fleiri eisni av tilboðnum um at gista har.

Umhvørvið á matstovuni er hugnaligt. Ikki for nógv er gjørt burturúr, men tað skal sigast, at borðini gott kundu verið eitt sindur meira kreativt prýdd. Við nøkrum av borðinum er gott útsýni.

À matarlepanum eru teir vanligu forrættirnir sum eitt nú rækjubland, suppa og laksur. Búffarnir eiga eisini sín stóra part av lepanum, tá hugt verður høvðusrættum. Ìsurin er at kalla einaráðandi, tá tann síðsta síðan verður hugd at.

Forrætturin var suppa hjá tveimum, rækjubland hjá hinum. Suppan var bláber suppa, sum minti um mangar konfirmatiónir. Suppan var bara góð, men var heldur nakað, sum tú ikki hevði roynt áður. Rækjublandið smakkaði somuleiðis væl, men aftur hesaferð var saknur á tí kreativa. Thousand Island dressingin minti kanska í so nógv um burgarar til veruliga ein fáa tey hálovandi orðini fram.

Allir høvdu valt høvuðsrættin at vera ein búff. Búffarnir eru nú føðin, sum flestu føroyingar velja, tá farið verður út at eta. Onnur ting eru eisini á matarlepanum, men vit valdu at halda traditiónina við líka.

Búffurin hjá mær var óføra góður. Veruliga ein leskiligur biti, sum veruliga fekk tað besta í smakkisansunum fram. Ríkiligt av ymiskum var afturvið, og hetta gjørdi hetta til eina veruliga góða máltíð, sum fekk tær einki serliga penu orðini at verða strikaði av blokkinum. Afturvið búffinum var eitt hálvturt einki serligt úr Fraklandi.

Omaná var sum vera man valdur ísur. Hesin var við sjókulátu og einari peru. Tað er nú einaferð soleiðis, at dessertin smakkar best, tá búkuin er líkavið at bresta av góðum mati, og soleiðis var eisini hesuferð. Ísurin smakkaði sum so væl, men aftur hesaferð var tað líkasum, at tað mangla eitt sindur av kreativiteti.

Sum heild var talan um góðan mat. Nøkur álvarsom mistøk ger tað neyðugt at seta ein fingur á tænastuna. Eisini var tað rættiliga iriterandi, at hurðin stóð á glop, meðan vit sótu og ótu.

Góður matur á einum rímiliga hugnaligum stað. Tó ikki ein heildarmeting, sum toppar á stiðjanum.




*Á la Carreta ber bæði til at gista og eta.*

Býin

MOONSHOT Á STRONDUM
Góður dansur verður á Strondum leygarkvøldið
Moonshot spælir
STRÁLAN

NÁTT-BUSSURIN
Leið Vestmanna
Bussarnir:

NÁTT-BUSSURIN
Leið Strendur
Bussarnir:

AUTO
-Dag sum nátt- -skjótt og gott-
-ALT DØGNIÐ-
BENZIN
DIESEL
KIOSK
AUTO
311234

www.sosialurin.fo
www.sosialurin.fo



## Í Býin

Vit selja allar rættir út av húsinum t.d.
• Cafédrykkir og súpan í termokrússum
• Pitabreyð v/tun ella oksakjøti
• Sandwich o.m.a.
Livandi tónleikur til 27. august syngur og spælir enski vísusangarin Doc
livandi tónleikur
CAFÉ NATÚR
Tlf. 31 26 25

HESA VIKUNA
Annfinn Gaard — Hóskvøldið
Martin Kjærbo — Fríggjakvøldið ladies night
Høgni Zakariasen & Rúni Jákupson — Leygarkvøldið
Sunnukvøldið »KARAOKE«
FÓTBÓLTUR Á STÓRSKÍGGJA
Café'in hevur opið mán.-frí. 17.00-24.00 og leyg.-sun. 14.00-24.00
Club 20 Café
Írskur búffur v/chips, salat & whiskeysós
EISINI TANN BESTI Í LANDINUM
69,-
Discoteque Club 20
Tinghúsvegur • Tórshavn • Tlf. 31 56 28
www.club20.fo

fk Matseðilin
Hósdagin 23. aug.: Gullash
Fríggjadagin 24. aug.: Skinkusalat
Leygardagin 25. aug.: Nakkasteik
Mánadagin 27. aug.: Kjøtbollar í karry
Týsdagin 28. aug.: Fiskafrikadellur
Mikudagin 29. aug.: Minuttbúffar
***
Seinnaparts-TILBOÐ frá kl. 14.00:
Juniorburgari 14.,95
Maxiburgari *ella*
Búffsandwich 19,95
Matstovan í Hoyvík

Kaggin
Dansur verður í vikuskiftinum
Kaggin
KAGGIN
www.kaggin.fo

Klaksvíkar Klubbi
Tlf. 455681
Fríggjadagin 24. august
• "Fimmari"
• Opið er frá kl. 17.00
UNDIRHALD
Leygardagin 25. august
• Opið frá kl. 22.00
• Dansur frá kl. 24.00 - 04.00
Njál & Mouritz spæla

Í Býin
- hvønn hósdag

fríggjakvøldið Discoteque
Niclas & Lena spæla
20 ára aldursmark
PLATFORM
discoteque

Njótið matin í okkara friðsæla og hugnaliga umhvørvi
Hotel Hafnia
Áarvegur 4-10 • Postboks 107
110 Tórshavn
Tel. 31 32 33 • Fax 31 52 50
E-mail: hafnia@hafnia.fo
www.hafnia.fo

Felagið Tórshøll
Hetta vikuskiftið spæla
Tey av Kamarinum
Hvørt fríggjakvøld, leygarkvøld og sunnukvøld er livandi tónleikur
Nú fleiri ódýrar eindir allar dagar
Felagið Tórshøll
Sverrisgøta 22
Tlf. 31 15 65